HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Avloysarar fyri laborantar

## Evnafrøðiliga kanningarstovan

**Starvslýsing**
Evnafrøðiliga kanningarstovan á Heilsufrøðiligu starvsstovuni søkir eftir einum laboranti til eitt avloysarastarv.

Avloysarastarvið, sum er fulla tíð, fevnir um vanligar kemiskar kanningar av drekkivatni, mati, umhvørvissýnum og øðrum.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir innan vanligar evnafrøðiligar kanningar, góðskustýring og EDV á brúkarastøði er ein fyrimunur, men eingin treyt.
Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fyri tíðarskeiðið 12. august 2002 til 1. juni 2003. Starvið verður lønt í 4. lønarflokki sambært sáttmála við Starvsmannafelagið, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo

**Umsóknin**
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. juli 2002.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Maritu Poulsen, deildarleiðara, tlf. 35 64 00.

**Evnafrøðiliga kanningarstovan**
Evnafrøðiliga kanningarstovan ger kanningar av mati, vatni, fóðri og umhvørvissýnum. Hon er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirliti av DANAK (Dansk Akkreditering), sí annars www.hfs.fo.

## Mikrobiologiska kanningarstovan

**Starvslýsing**
Í.s.v. at nakrir laborantar fyribils fara á niðursetta tíð og ein fær farloyvi longt, verður søkt eftir tveimum laborantum til mikrobiologisku kanningarstovuna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Arbeiðið sum laborantur fevnir um vanligar mikrobiologiskar kanningar av mati, drekkivatni og øðrum.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Roydnir innan vanligar mikrobiologiskar kanningar, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru ein fyrimunur, men eingin treyt.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Annað avloysarastarvið er fulla tíð. Setanin byrjar 12. august 2002 og endar 1. juli 2003

Hitt avloysarastarvið er _ tíð. Setanin byrjar 12. august og endar 31. desember 2002.

Lønin verður í 4. lønarflokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum. Sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo

**Umsóknin**
Umsóknir til størvini, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. juli 2002.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Birnu Mørkøre, deildarleiðara, tlf. 35 64 00.

**Mikrobiologiska kanningarstovan**
Á kanningarstovuni eru í løtuni 7 laborantar í føstum starvi, 2 hjálparfólk og ein akademikari. Kanningarstovan er altjóða góðkend av DANAK.

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

# Skrivstovunæmingur

Á skrivstovuni á Heilsufrøðiligu starvsstovuni er eitt lærupláss í við heitinum Skrivstovuútbúgving leyst at søkja. Hetta er aðru ferð, at vit taka skrivstovunæming í læru.

**Lýsing av læruplássinum**
Skrivstovan er tænastudeild fyri Heilsufrøðiligu starvsstovuna, so talan er um eitt sera fjøltáttað lærupláss, har tú í lærutíðini fært møguleika at menna tín førleika innanfyri hesi øki:

- Samskifti sum heild, bæði innanhýsis og við viðskiftarar
- Postskipan
- Journalisering
- Lønarviðurskifti sum heild
- Bókhald, herundir finans, debitor og kreditor
- Onnur øki, sum hoyra til skrivstovuna á stovninum.

Av tí at skrivstovan er tænastudeild fyri allan stovnin, eru arbeiðsuppgávurnar sera fjøltáttaðar, og sum oftast er arbeiðsbyrðan sera stór.

Vit kunnu bjóða eitt lærupláss, har nýggj tøkni er grundarlagið undir øllum virkseminum á skrivstovuni. Undir útbúgvingini verður møguleiki at luttaka á skeiðum, sum hava týdning fyri læruna.

**Krøv til útbúgving**
Skikkað at søkja starvið eru tey, sum hava lokið HH-prógv (lærutíðin er tá 2 ár), FHS (lærutíðin er tá 3 ár) ella students-, HF- ella HT-útbúgving (lærutíðin er tá 2 ár og 18 vikur).

**Løn og setanarviðurskifti**
eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið, sí http://www.lnd.fo. Um lærutíðin er 2 ár, er lønin tey bæði læruárini ávikavist 60% og 70% av lønini í 2. flokki, 1. stigi, og um lærutíðin er 3 ár, er lønin ávikavist 50%, 60% og 70% av lønini í 2. flokki, 1. stigi.

Tú kanst byrja læruna mánadagin 19. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknarfreist**
Hevur hetta tín áhuga, so ert tú vælkomin at søkja læruplássið. Umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinast lagi mikudagin 10. juli 2002.

**Upplýsingar**
Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Hjørdis Næs, lærumeistara, ella Bárð Enni, stjóra. Sí eisini heimasíðuna hjá Yrkisdepilinum, www.yrkisdepil.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 350, Sp/f J. D. Hammer, 800 Tvøroyri.

Nevnd:
Farin úr nevndini: John Dion Hammer, 800 Tvøroyri (formaður) og Tove Mariane Hammer, 800 Tvøroyri.
Innkomin í nevndina: Torfinnur Hammer, 800 Tvøroyri (formaður) og Helena Petersen, 800 Tvøroyri.

Skráseting Føroya tann 24. juni 2002

Kristin Balle

# Móttøka

*Í samband við at Sofus Poulsen, umboðsmaður Føroya í Aberdeen, fer frá 1. juli eftir trúgva tænastu, verður móttøka í móttøkuhølum løgmans í Skansapakkhúsinum í Tinganesi*

*mikudagin 26. juni 2002 kl 15.00-17.00*

*Løgmansskrivstovan*

Sosialurin - Tel. 311820

# Summarfrí

Handilin er stongdur vegna summarfrí frá 29/6 - 31/7.

**Hondarbeiðsbúðin
í Dr. Jakobsensgøtu 5**

# Skrivstovuhølir

ynskjast til leigu, skjótast tilber, í Runavík ella í Runavíkar umráðinum.

**P/F Faroe Marine Biotech**
tlf. 220772 ella 222034

# Sethús til sølu





Sethús á Kambsdali til sølu, um hóskandi boð fast.

**Telefon : 444244 ella 212656**



# Avloysarastarv

Søkt verður eftir fólki til fulltíðarstarv á Dómaraskrivstovuni til setan skjótast gjørligt. Setanartíðin er 6 mánaðir.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðslu

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst:
- Skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- Góð evni at samskifa á føroyskum og donskum máli
- Telduførleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 311003.

**Umsóknir:**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu verða Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juli 2002.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
tann 21. juni 2002
Jørgen B. Petersen, adm.

SORINSKRIVARIN Í FØROYUM

# Pedagogur/-hjálparfólk

Søkt verður eftir tveimum pedagogum/hjálparfólki til barnagarðin við Velbastaðvegin, bæði størvini eru 40 tímar um vikuna, at byrja 5. august 2002.

Størvini eru fyri fólk sum eru í barnsburðarfarloyvi. Størvini eru til 1. januar 2003 og 1. februar 2003.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3-7 ár, býtt sundur í 3 stovur. Á hvørjari stovu starvast trý starvsfólk.

Tann ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum. Viðkomandi ið settur verður, skal duga at síggja møguleikarnar í okkara náttúruumhvørvi saman við børnunum.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 3. juli 2002 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO-100 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3369
Navn: Sp/f Pólar
Adressa: Sigmundargøta 26, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 20.06.2002
Viðtøkudato: 20.06.2002
Kapitalur: Kr. 170.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 170.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Jóhan Margeir Ørvarodd, Eiriksgøta, 100 Tórshavn.
Stjórn: Jóhan Margeir Ørvarodd, Eiriksgøta, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: : Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handverk, keyp og sølu umframt aðra vinnu, ið stendur í samband við nevnda rakstur.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 24. juni 2002

Kristin Balle

# Vaskifólk

Søkt verður eftir fólki at vaska rávørumóttøku- og pakkihøllina á P/F Kollafjørð Pelagic í Kollafirði.

Arbeiðið fer fram eftir vanliga arbeiðstíð.

Arbeiðið byrjar 1. juli 2002.

**Eysturoyar Reingering**
Postboks 41, 650 Toftir
448988 & 225350

Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin

**Mentamálastýrið**
*Mentamáladeildin*

## *Endurlýsing*
## Lærarastarv á Føroya Læraraskúla

**Lærarastarv á Føroya Læraraskúla:**
Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi pedagogiskum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Læraraskúla.
Føroya Læraraskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnis- og verkætlanararbeiði.
Starvið, sum leyst er at søkja, er hetta:

**Sálarfrøði og serlestur:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er sálarfrøði og serlestur á lærarautbúgvingini og pedagogútbúgvingini.

Tann, ið settur verður í starvið, eigur at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni. Tó hava eisini lesandi, ið vænta at vera liðug við útbúgvingina í skúlaárinum, høvi at søkja starvið. Viðkomandi skal vera fús/ur at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein ella lærugreinum við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.

Eisini fær tann, ið settur verður, møguleika at undirvísa á teimum útbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Umsóknirnar skulu stílast til Mentamálaráðið, men verða at senda til,

**Føroya Læraraskúla
Frælsið 20
100 Tórshavn**

og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 12. juli 2002.

Tey, sum ynskja fleiri upplýsingar um starvið, eru væl komin at seta seg í samband við Arna Ludvig á
**tlf. 42 14 22.**

**Mentamálaráðið**
Postsmoga 3279
110 Tórshavn

veitst tú ikki tað?

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Útbjóðing

Tórshavnar kommuna bjóðar við hesum koyringina av bussleiðini út í almenna útbjóðing.

Møguleiki er at bjóða uppá eina, fleiri ella allar leiðir, sum eru leið 1, 2, 3, 4, 4x og skúlaleið.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til:

Snarskivuna
Vaglið
FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 51 60

Í seinasti lagi 05. august 2002.

Ímóti krossaðum kekki, ájlóðandi kr. 5.000,-, sum verður latið teimum bjóðandi aftur, tá ið útbjóðingartilfarið er latið Tórshavnar kommunu aftur.

Tilboðini skulu verða Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. august 2002 kl. 13.00, tá tey verða latin upp í býráðssalinum. Teir bjóðandi kunnu vera hjástaddir.

SNARSKIVAN